KRINGVARP FØROYA

# Ársfrásøgn 2014

# Innihaldsyvirlit

**Síða**

UPPLÝSINGAR UM STOVNIN 3

ROKNSKAPARÁTEKNING LEIÐSLUNNAR 4

VÁTTAN FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA 5

LEIÐSLUFRÁGREIÐING 6

NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR 10

RAKSTRARROKNSKAPUR 2014, KRINGVARP FØROYA 13

FÍGGJARSTØÐA TANN 31. DESEMBER 2014, KRINGVARP FØROYA 14

NOTUR 15

# Upplýsingar um stovnin

Kringvarp Føroya
Norðari Ringvegur
100 Tórshavn

Roknskaparár: 1. januar – 31. desember

## Kringvarpsstýri

Rúni Heinesen (formaður)
Hjalmar Hansen (næstformaður)
Kári Sólstein
Theodor E. D. Olsen
Katrin Petersen
Aibritt á Plógv
Gunnvá við Keldu

## Stjórn

Dia Midjord
*stjóri*

## Grannskoðan

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f
Staravegur 17
FO-100 Tórshavn

KRINGVARP FØROYA

# Roknskaparátekning leiðslunnar

**Stýri og stjórn hava í dag viðgjørt og viðtikið ársfrásøgnina fyri 2014 fyri Kringvarp Føroya.**

Ársroknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við ásetingarnar í "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o. t."

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og somuleiðis av ognum og skuld um fíggjarárslok er í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o. t."

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Tórshavn hin 26. mai 2015

Stjórn:

Dia Midjord
*stjóri*

Nevnd:

Rúni Heinesen
*formaður*

Hjalmar Hansen
*næstformaður*

Kári Sólstein

Theodor E. D. Olsen

Katrin Petersen

Aibritt á Plógv

Gunnvá við Keldu

KRINGVARP FØROYA

# Váttan frá óheftum grannskoðara

*Til kringvarpsstýrið*

## Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Kringvarp Føroya fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2014 við nýttum roknskaparhátti, játtanarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.".

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, sum í øllum týðandi lutum er í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.". Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

## Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni, herundir "Løgtingslóg nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.". Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at stovnurin kann gera ein ársroknskap, sum er rættur, tað vil siga uttan týðandi skeivleikar. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin fyri 2014 gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og somuleiðis av ognum og skuld um fíggjarárslok í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.".

## Ískoytisupplýsingar um viðurskifti í ársroknskapinum

Uttan at taka fyrivarni verður víst til notu 1 til ársroknskapin, har leiðslan greiðir frá týðandi óvissum í ársroknskapinum fyri 2014 vegna óvissu knýttari at inntøkunum frá kringvarpsgjaldi og óvissu vegna roknskaparligu viðgerðini av skyldugum starvsfólkakostnaði.

## Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Vit hava lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, hin 26. mai 2015

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Jóhannes Færø
*statsaut. revisor*

# Leiðslufrágreiðing

Árið í fjør eydnaðist væl hjá Kringvarpi Føroya. Úrslitið í 2014 áðrenn rentur, avskrivingar og íløgur var 2,3 mió.kr. betri enn árið frammanundan.

**Inntøkur**
Inntøkurnar hækkaðu 3,1 mió.kr. í mun til árið fyri, úr góðum 61 mió.kr. upp í góðar 64 mió.kr.

| Inntøkur kr. | 2014 | 2013 | munur |
|---|---|---|---|
| Kringvarpsgjald | 47.078.366 | 46.796.357 | 282.009 |
| Kunngerðir og lýsingar | 5.870.299 | 7.480.688 | -1.610.389 |
| Spæl, netto inntøka | 10.602.328 | 6.284.628 | 4.317.700 |
| Annað | 625.528 | 470.684 | 154.844 |
| **Samanlagt** | **64.176.511** | **61.032.357** | **3.144.164** |

Talvan omanfyri vísir, at samlaðu inntøkurnar hækkaðu nógv. Serliga er tað inntøkan frá spølum, ið er hækkað nógv og sum sostatt gav 4,3 mió.kr. í meirinntøkum í 2014.

Inntøkan frá kringvarpsgjaldi var á sama støði sum árið fyri, aðrar inntøkur hækkaðu nakað, meðan inntøkurnar frá kunngerðum og lýsingum lækkaðu munandi.

**Útreiðslur**
Framleiðandi deildirnar vóru slakar 1,7 mió.kr. dýrari at reka enn árið fyri. Ein orsøk er sáttmálabundnar lønarhækkingar, men øktu inntøkurnar í 2014 hava eisini givið møguleikar fyri øktari framleiðslu og harav øktum útreiðslum.

| Útreiðslur 1.000 tkr. | 2014 | 2013 | munur |
|---|---|---|---|
| Aktuelt/Tíðindadeildin | 9.888.482 | 9.229.727 | 658.755 |
| Mentan/Programdeildin | 11.027.691 | 11.010.134 | 17.557 |
| Tøknideildin(framleiðsla) | 9.101.606 | 8.089.591 | 1.012.015 |
| **Samanlagt** | **30.017.779** | **28.329.452** | **1.688.327** |

Aftrat framleiðandi deildunum er Fyrisitingin, sum var 0,5 mió.kr. bíligari at reka í mun til árið frammanundan. Parturin av Tøknideildini, sum ikki er framleiðsla, kostaði 13,1 mió.kr. at reka í 2014. Tað er 0,9 mió.kr. minni enn árið frammanundan.

Úrslitið hjá Kringvarpi Føroya áðrenn rentur, avskrivingar og íløgur í 2014 var 2,3 mió.kr. betri enn í 2013. Útreiðslurnar vóru 0,8 mio.kr. hægri og inntøkurnar vóru 3,1 mió.kr. hægri.

Upphæddin fyri avskrivingar og avsetingar av skuldarum í 2014 er 1,4 mió.kr. lægri enn árið fyri. So samanumtikið kann sigast, at úrslitið hjá Kringvarpi Føroya í 2014 var gott.

# Leiðslufrágreiðing

## Programmvirksemið í KvF

Kringvarp Føroya hevur samsvarandi kringvarpslógini skyldu til at kringvarpa sendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. Í programmvirkseminum skal Kringvarp Føroya leggja dent á upplýsingar- og talufrælsi, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga.

Virksemið í Kringvarpi Føroya er samsvarandi Public Service sáttmálanum, sum Kringvarp Føroya hevur við Mentamálaráðið. Á hvørjum ári verður ein frágreiðing gjørd, sum lýsir alt virksemið hjá Kringvarpi Føroya. Frágreiðingin finst á heimasíðunum hjá Mentamálaráðnum og Kringvarpinum.

## Spara saman spæliinntøkur

Eftir fleiri áheitanir fekk Kringvarp Føroya á sumri 2014 heimild at flyta inntøkur frá eydnuspølum tvørtur um ár.

Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovan meta, at spæliinntøkurnar hjá Kringvarpi Føroya kunnu sammetast við fremmanda fígging, sambært §13, stk. 5 í roknskaparkunngerðini:

> Inntøkur av verkætlanum o. t. - sum rætturin til at taka ímóti, er treytaður av, at ávíst virksemi verður framt - verða tiknar við sum inntøka so hvørt, sum peningurin verður nýttur til ætlaða endamálið.

Víst verður á, at skipanin hjá Kringvarpi Føroya við fremmandari fígging er ein restfígging, og tað kann ikki samanberast við heimildina at flyta avlop tvørtur um ár, sum í 2010 varð strikað í kringvarpslógini.

Uppsparda upphæddin frá fremmandari fígging hjá Kringvarpi Føroya kann verða samansavnað eftir einum ella fleiri árum, og kann nýtast eftir einum ella fleiri árum.

At stovnurin hevur fingið hesa heimild hevur stóran týdning. Stovnurin kann í størri mun leggja til síðis og leggja til rættis, so at pengarnir verða brúktir á skilabesta hátt. Heimildin gevur eisini stovninum møguleikan at styrkja fíggjarligu støðuna, so at Kringvarp Føroya hevur pengar at standa ímóti við, um raksturin gevur hall.

Av tí at eydnuspølini góvu nógv í 2014, hevur Kringvarp Føroya longu eina uppsparda upphædd. Sjey milliónir krónur eru fluttar til seinni ár, harav tær tríggjar eru oyramerktar til at standa ímóti við.

# Leiðslufrágreiðing

## SavnsGull

Arbeiðið at talgilda bandasøvnini hjá Kringvarpi Føroya er komið í eina trygga legu. Verkætlanin við heitinum SavnsGull fær 900.000 krónur á serstakari játtan á fíggjarlógini.

Í nógv ár varð kjakast um, hvørt tað var Kringvarp Føroya, Mentamálaráðið ella ein triði partur, sum átti uppgávuna at talgilda henda mentanararv.

Leiðslan í Kringvarpi Føroya tók málið upp við Mentamálaráðið á vári 2013, og stutt eftir játtaði løgtingið pengar á fíggjarlógini, so at Kringvarp Føroya kundi keypa neyðuga útgerð til at talgilda útvarpsbond. Harafturat varð onnur útgerð útvega, so at verkætlanin kundi byrja.

Á vári 2014 setti Kringvarp Føroya ein samskipara at fáa gongd á málið, og seinni hevur verkætlanin SavnsGull fingið ein varandi leiðara.

Higartil er játtanin á 900.000 kr. nýtt til at talgilda útvarpsbond og pappírstíðindi, og verða fleiri pengar játtaðir, so verður gongd eisini sett á arbeiðið at talgilda sjónvarpsbond.

## Út- og umbygging

Fyrrapartin 11. november 2014 varð skipað fyri stuttum hátíðarhaldi, tá Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í mentamálum, setti hakan í svørðin og loysti fyrsta bøkkin í ætlanini at byggja út kringvarpshúsini. Hakin varð settur í norðanfyri, har ein bygningur, sum skal hýsa redigeringshølum og tøkni, verður bygdur upp í verandi hús.

Eftir ætlan skal fyrsta byggistig kosta 8,4 milliónir krónur. Byggifelagið ÁTS, sum Karstin Vang í Kaldbak eigur, hevði lægsta boð, tá Landsverk bjóðaði arbeiðið út á vári 2014.

Arbeiðið at byggja út norðan fyri verður væntandi liðugt í august 2015. Tað er enn ikki ásett, nær farið verður at gera umsitingarhølini og nýggju forhøllina á sunnaru síðu.

Tilboðini fyri framleiðsluhølini, umsitingarhølini og forhøllina vóru á leið fimm milliónir krónur hægri enn tað, Landsverk metti upprunaliga.

Tí er skarvað av ætlanini, so hon verður mett at verða tvær milliónir bíligari. Enn er ikki greitt, um fígging fæst til henda partin av útbyggingarætlanini.

## Nýggir karmar

6. juni í 2014 tók Kringvarp Føroya alment í nýtslu nýggja sjónvarpsstovu og hartil hoyrandi kontroll-rúm, sum eru karmur um allar regluligar sjónvarpssendingar, eitt nú tíðindi, ítrótt, mentanarsendingar og gekkaspælið. Tað er gamla studio 2 í útvarpinum, sum er karmur um spildurnýggju sjónvarpsstovuna.

# Leiðslufrágreiðing

## Ávegis atgongd til almennar skráir

Kringvarp Føroya hevur skyldu at hava eina skrá við neyðugum upplýsingum um húski, arbeiðspláss og høli, sum koma undir gjaldskyldu. Men eingin almenn skrá yvir húski, arbeiðspláss o.a. inniheldur allar upplýsingar, Kringvarp Føroya hevur tørv á, fyri at krevja kringvarpsgjaldið rætt inn frá øllum, sum eru fevnd av gjaldskyldu.

Tað hevur gingið striltið at fáa atgongd til upplýsingar frá almennu myndugleikunum, og tí er skráin hjá Kringvarpi Føroya ófullfíggjað. Ein avtala er nýliga gjørd við Landsfólkayvirlitið um atgongd til teirra skrá, og KT deildin í Kringvarpi Føroya kann tí nú fara undir at menna hættir at dagføra skránna við kringvarpsgjaldarum.

## Avbjóðingar í framtíðini

Digitaliseringin á miðlaøkinum ella talgildingin er í ferð við at broyta miðlanýtsluna hjá brúkarunum, sum í alt størri mun ynskja at brúka miðlatilfarið, tá stundir eru og ikki eitt ávíst tíðspunkt.

Kringvarp Føroya má taka broyttu miðlanýtsluna í ramasta álvara og fremja neyðug átøk í mun til siðbundnu miðlarnar.

Upptøkuútgerðin hjá Kringvarpi Føroya er eisini afturútsigld. Vit arbeiða framvegis við Standard góðsku, meðan allir aðrir loftmiðlar í norðurlondum arbeiða við HD gósðku. Íløgan - at uppstiga upptøkuútgerð, redigeringseindir og aðra útgerð til HD - er einar 10 mió.kr.

Men hóast avbjóðingar í framtíðini, so gongur tað rætta vegin, og bæði leiðsla og starvsfólk trúgva upp á eina mennandi og spennandi framtíð.

Leiðslan væntar eitt hendingaríkt 2015, har arbeitt verður víðari við at skipa viðurskiftini á stovninum og leggja alt í fastar karmar.

# Nýttur roknskaparháttur

### Inngangur

Ársfrásøgnin fyri Kringvarp Føroya fyri 2014 er gjørd í samsvari við ásetingarnar í Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir somu roknskaparreglum sum undanfarna ár.

## Rakstrarroknskapurin

### Inntøkur og útreiðslur

Inntøkur og útreiðslur, sum stava frá vørum og tænastuveitingum, verða skrásettar, tá ið tær eru latnar.

Í teimum førum, tá útreiðslur ella inntøkur ikki stava frá vørum og tænastuveitingum, verða tær skrásettar, so skjótt upphæddin kann gerast upp, og í seinasta lagi, tá ið goldið verður. Ein upphædd kann gerast upp, um eitt rættarligt krav eftir eini væl greinaðari upphædd kann gerast galdandi. Um eitt munandi krav, sum er til eitt ávíst fíggjarár, ikki kann gerast endaliga upp, áðrenn roknskaparárið er lokið, verður upphæddin skrásett á einari rakstrarkonto í roknskapinum fyri tað fíggjarárið, grundað á eina meting, soleiðis at upphæddin verður rættað í tí fíggjarári, tá ið kravið endaliga kann verða gjørt upp.

## Fíggjarstøðan

### Materiell støðisogn

Íløgur og størri viðlíkahald, sum er ein betring av verandi støðisogn, verður eins og vanligt viðlíkahald útreiðsluført í rakstrarroknskapinum.

Materiell støðisogn, hvørs keypsvirði er yvir 75 tkr., verður skrásett sum materiell støðisogn og ein samsvarandi mótkonto verður skrásett beinleiðis undir eginognini. Materiella støðisognin verður upptikin til kostprís við frádrátti av avskrivingum. Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og sett út frá væntaðu brúkstíðini og mettum restvirði. Avskrivingarnar hava onga ávirkan á raksturin, við tað at talan er um tekniskar avskrivingar.

Niður- ella uppskrivingar av skrásettari materiellari støðisogn verður skrásett, um tað kann staðfestast, at roknskaparliga virðisbroytingin á støðisognini er varandi. Talan er um eina roknskaparliga skráseting, sum ikki ávirkar rakstrarroknskapin.

# Nýttur roknskaparháttur

## Goymsla

Eins og undanfarin ár, er virðið á vørugoymsluni ikki tikið við á goymslukonto í fíggjarstøðuni, við tað at játtanarheimild ikki er til tess.

## Vøru- og tænastuáogn

Vøru- og tænastuáogn verður virðisásett til amoritseraðan kostprís, har hædd verður tikin fyri væntaðum tapum.

## Onnur áogn

Onnur áogn fevnir um áogn hjá starvsfólkum og meirvirðisgjald.

## Millumrokningar

Stuttfreistað skuld hjá Kringvarp Føroya til Gjaldstovuna fevnir um millumrokning vegna peningaflytingar sum Gjaldstovan hevur gjørt vegna Kringvarp Føroya.

## Onnur skuld

Onnur skuld verður virðissett til nettorealisatiónsvirði og fevnir um skyldugar vinningar í sambandi við spøl, afturhildnan skatt í sambandi við spøl, skyldugan starvsfólkakostnað og annan skyldugan kostnað.

## Støðlað avlop

Støðlað avlop verður virðissett til nettorealisatiónsvirði og fevnir um avlop frá eydnuspølum.

Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovan meta, at spæliinntøkurnar hjá Kringvarpi Føroya kunnu sammetast við fremmanda fígging, sambært §13, stk. 5 í roknskaparkunngerðini:

> Inntøkur av verkætlanum o. t. - sum rætturin til at taka ímóti, er treytaður av, at ávíst virksemi verður framt - verða tiknar við sum inntøka so hvørt, sum peningurin verður nýttur til ætlaða endamálið.

Uppspard upphædd frá fremmandari fígging kann verða samansavnað eftir einum ella fleiri árum, og kann nýtast eftir einum ella fleiri árum.

# Nýttur roknskaparháttur

## Avsettar skyldur

Avsettar skyldur verða tiknar við í ársroknskapin, tá ið ein bindandi hending er farin fram, og skyldan er sannlík, men óvist er, nær upphæddin fellur til gjaldingar, ella hvussu stór upphæddin er. Nýtslan av avsettum skyldum verður javnað, tá ið skyldan kann gerast endaliga upp, og skyldan verður útint.

Samsvarandi nýttum roknskaparhátti í landsroknskapinum verða skyldugar starvsfólkaskyldur ikki tiknar við í ársroknskapin uttan so, at tað ikki er óvist, nær upphæddin fellur til gjaldingar og hvussu stór upphæddin er. Skyldug avspáking verður tikin við sum ein skylda undir onnur skuld.

# Rakstrarroknskapur 2014, Kringvarp Føroya

KRINGVARP FØROYA

| Nota | | 2014 | 2013 |
|---|---|---|---|
| 2 | Inntøkur | 64.176.511 | 61.032.357 |
| 3 | Framleiðandi deildir | -30.017.779 | -28.329.452 |
| 4 | Stuðlandi deildir | -19.564.114 | -20.984.917 |
| 5 | Annar kostnaður | -3.476.679 | -2.925.881 |
| | **Úrslit áðrenn rentur, avskrivingar og íløgur** | **11.117.939** | **8.792.107** |
| | | | |
| | Íløgur og størri viðlíkahald | -3.722.140 | -9.739.671 |
| | Avskrivingar og avsetingar av skuldarum | -399.668 | -1.794.003 |
| | **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **-6.996.131** | **-2.741.567** |
| | | | |
| | Aðrar fíggjarligar inntøkur | 54.802 | 87.975 |
| | Aðrir fíggarligir kostnaðir | -6.830 | -10.376 |
| | **Úrslit áðrenn støðling av avlopi** | **-7.044.103** | **-2.663.968** |
| | | | |
| | Støðlað avlop frá eydnuspølum | 7.044.103 | 0 |
| | **Ársúrslit** | **0** | **-2.663.968** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2014, Kringvarp Føroya

KRINGVARP FØROYA

| Nota | OGN | 2014 | 2013 |
|---|---|---|---|
| | Grundøki | 3.183.768 | 3.183.768 |
| | Bygningur | 13.243.168 | 13.243.168 |
| | Akfør | 313.517 | 495.797 |
| | **Materiel støðisogn til samans** | **16.740.453** | **16.922.733** |
| 6 | Vøru- og tænastuáogn, kunngerðir og lýsingar | 1.992.901 | 2.779.946 |
| 7 | Vøru- og tænastuáogn, Kringvarpsgjald | 2.633.013 | 5.048.700 |
| 8 | Onnur áogn | 367.978 | 2.028.807 |
| | **Áogn til samans** | **4.993.892** | **9.857.453** |
| 9 | Tøkur peningur | 22.817.899 | 7.396.136 |
| | **Ogn í umferð til samans** | **27.811.791** | **17.253.589** |
| | **Ogn til samans** | **44.552.244** | **34.176.322** |

| Nota | SKYLDUR | 2014 | 2013 |
|---|---|---|---|
| | Eginogn við ársbyrjan | -4.340.040 | -1.676.072 |
| | Mótkonto, bygningur | 13.243.168 | 13.243.168 |
| | Mótkonto, onnur materiel støðisogn | 3.497.285 | 3.679.565 |
| | Mótkonto, upphædd á StRk. 0360 | 4.340.040 | 4.340.040 |
| | Ársúrslit áðrenn støðling | 7.044.103 | -2.663.968 |
| | Avlop flutt á Strk. 0881 | -7.044.103 | 0 |
| | **Egin ogn til samans** | **16.740.453** | **16.922.733** |
| | **Stuttfreistað skuld** | | |
| | Millumrokning við Gjaldstovuna | 17.752.999 | 14.984.525 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 0 | 0 |
| 10 | Onnur skuld | 3.014.689 | 2.269.064 |
| | Støðlað avlop | 7.044.103 | 0 |
| | **Stuttfreistað skuld til samans** | **27.811.791** | **17.253.589** |
| | **Skyldur til samans** | **44.552.244** | **34.176.322** |

Ognir, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuni (nota 11)

Skyldur, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuni (nota 12)

Eventualskyldur (nota 13)

# Notur

## 1 Týðandi roknskaparligar óvissur og viðurskifti

**Roknskaparlig viðgerð av skyldugum starvsfólkaskyldum**
Ógreitt er, hvussu skyldugar starvsfólkaskyldur skulu viðgerast roknskaparliga sambært "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t." Mettar starvsfólkaskyldur við árslok 2014, sum ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuna, eru vístar í notu 12. Roknskaparliga viðgerðin førir við sær eina ávísa óvissu í ársroknskapinum fyri 2014.

**Inntøkugrundarlagið viðvíkjandi kringvarpsgjaldi**
Kringvarp Føroya hevur skyldu at gera og dagføra eina skrá við neyðugum upplýsingum um húski, arbeiðspláss og høli, sum koma undir gjaldskyldu. Eingin av almennu skráunum yvir húski, arbeiðspláss o.a. innihalda allar tær upplýsingar, sum Kringvarp Føroya hevur tørv á fyri at krevja kringvarpsgjaldið rætt inn frá øllum, sum eru fevnd av gjaldskyldu.

Kringvarpsgjaldið er ein tung fyrisitingarlig uppgáva, tí tað krevur nógva umsiting at útvega upplýsingar, sum sambært lóggávu gera av, nær borgari ella virki hevur gjaldsskyldu og ikki. Talan er um upplýsingar bæði frá borgarum og myndugleikum og mangan skulu ítøkiligar metingar gerast.

Við einari ófullfíggjaðari skrá valdar óvissa um veruliga inntøkugrundarlagið hjá Kringvarpi Føroya. Um kringvarpsgjaldið skal krevjast rætt inn, má atgongd fáast til almennar skráir, sum innihalda viðkomandi upplýsingar. Harumframt er tørvur á, at gjaldskyldan og hvørji eru fevnd av henni bert tekur støði í viðurskiftum, sum finnast sum upplýsingar í skráum, sum almennu myndugleikarnir framman undan halda við líka, t.d. skrá yvir p-tøl, v-tøl, bústaðir o.a.

# Notur

2

| Inntøkur | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| Kringvarpsgjald | 47.078.366 | 46.796.357 |
| Útvarpskunngerðir og –lýsingar | 4.706.652 | 5.442.732 |
| Sjónvarpslýsingar og ískoytisveitingar | 1.163.647 | 2.037.956 |
| V4-spælið, netto | 374.914 | 478.319 |
| Gekkaspælið, netto | 10.227.414 | 5.806.309 |
| Aðrar inntøkur | 625.518 | 470.684 |
| Rakstrarstuðul frá Serinntøkum Kringvarpsins | 0 | 0 |
| **Inntøkur til samans** | **64.176.511** | **61.032.357** |

| V4-spælið, netto | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| Inntøkur | 859.392 | 1.591.226 |
| Lønir, samsýningar og lønartengdar útreiðslur | -179.154 | -85.585 |
| Aðrar útreiðslur | -305.324 | -1.027.322 |
| **V4-Spælið til samans** | **374.914** | **478.319** |

| Gekkaspælið, netto | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| Inntøkur | 19.143.840 | 12.511.280 |
| Lønir, samsýningar og lønartengdar útreiðslur | -425.547 | -309.590 |
| Aðrar útreiðslur | -8.490.879 | -6.395.381 |
| **Gekkaspælið til samans** | **10.227.414** | **5.806.309** |

# Notur

| 3 Framleiðandi deildir | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| **Aktuelt/Tíðindadeildin:** | | |
| Lønir og samsýningar | 9.453.451 | 8.762.632 |
| Vørur og tænastur | 435.031 | 467.095 |
| **Aktuelt/Tíðindadeildin til samans** | 9.888.482 | 9.229.727 |
| | | |
| **Mentan/Programmdeildin:** | | |
| Lønir og samsýningar | 9.889.492 | 10.018.559 |
| Vørur og tænastur | 1.138.199 | 991.575 |
| **Mentan/Programmdeildin til samans** | 11.027.691 | 11.010.134 |
| | | |
| **Tøknideildin (framleiðsluparturin):** | | |
| Lønir og samsýningar | 8.564.712 | 7.822.966 |
| Vørur og tænastur | 536.894 | 266.625 |
| **Tøknideildin (framleiðslupartur) til samans** | 9.101.606 | 8.089.591 |
| | | |
| **Framleiðandi deildir til samans** | **30.017.779** | **28.329.452** |

# Notur

| 4 Stuðlandi deildir | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| **Umsitingin:** | | |
| Lønir | 4.499.785 | 4.791.582 |
| Vørur og tænastur | 1.935.479 | 2.170.464 |
| Umsitingin til samans | 6.435.264 | 6.962.046 |
| | | |
| **Tøkni deildin (ikki framleiðslupartur):** | | |
| Lønir og samsýningar | 5.823.916 | 7.115.143 |
| Vørur og tænastur | 2.644.323 | 2.597.322 |
| Samskiftiskostnaður | 1.112.808 | 1.114.466 |
| Verkstaður | 252.884 | 165.633 |
| Húsakostnaður | 2.840.165 | 2.573.476 |
| Rakstur av akførum | 454.754 | 456.831 |
| Tøkni deildin til samans | 13.128.850 | 14.022.871 |
| | | |
| **Stuðlandi deildir til samans** | **19.564.114** | **20.984.917** |

| 5 Annar kostnaður | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| Kostnaður fyri rættindi | 3.476.679 | 2.999.281 |
| Ískoyti til teknmálstulking | 0 | -73.400 |
| **Annar kostnaður til samans** | **3.476.679** | **2.925.881** |

| 6 Vøru- og tænastuáogn, kunngerðir og lýsingar | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| Áogn, brutto | 2.807.627 | 3.567.310 |
| Avsett móti væntaðum tapi | -814.726 | -787.364 |
| **Vøru- og tænastuáogn, kunngerðir og lýsingar til samans** | **1.992.901** | **2.779.946** |

# Notur

| 7 Vøru- og tænastuáogn, kringvarpsgjald | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| Áogn, brutto | 7.333.013 | 9.648.700 |
| Avsett móti væntaðum tapi | -4.700.000 | -4.600.000 |
| **Vøru- og tænastuáogn, kringvarpsgjald til samans** | **2.633.013** | **5.048.700** |

| 8 Onnur áogn | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| Meirvirðisgjald | 214.411 | 884.209 |
| Depositum | 76.082 | 0 |
| Ferðaforskot | 58.274 | 57.623 |
| Tíðaravmarkingar og onnur áogn | 19.211 | 1.086.975 |
| **Onnur áogn til samans** | **367.978** | **2.028.807** |

| 9 Tøkur peningur | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| BankNordik | 14.506.202 | 2.822.253 |
| Eik Banki | 5.008.518 | 2.973.474 |
| Norðoya Sparikassi | 1.719.561 | 657.107 |
| Suðuroyar Sparikassi | 1.581.418 | 941.302 |
| Kassapeningur | 2.200 | 2.000 |
| **Onnur áogn til samans** | **22.817.899** | **7.396.136** |

| 10 Onnur skuld | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| Skyldug avspáking | 718.400 | 291.600 |
| Skyldugt frítíðaríkoyti | 313.000 | 295.000 |
| Eydnuspøl | 1.475.543 | 789.239 |
| Upphavsrættargrunnur | 87.927 | 65.043 |
| Tíðaravmarkingar | 419.819 | 828.182 |
| **Onnur áogn til samans** | **3.014.689** | **2.269.064** |

# Notur

## 11 Ognir, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuni

Kringvarp Føroya førir yvirlit yvir materiella støðisogn, men einans bygningurin og akfør eru skrásett í fíggjarstøðuni í Búskaparskipan Landsins.

Tilgongdir viðvíkjandi bygningi og akførum, sum eru førdar yvir raksturin seinastu 3-4 árini, eru ikki tiknar við í fíggjarstøðuna. Tó er kostnaðurin viðvíkjandi umbyggingini í 2013 á 5,0 mió.kr. tikin við í fíggjarstøðuna, hóast umbyggingin ikki er skrásett í Búskaparskipan Landsins. Ætlanin er at gera hesar tilgongdir upp og taka tær við í fíggjarstøðuna í Búskaparskipan Landsins.

## 12 Skyldur, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuni

Skyldug restferia frá innvinningarárinum 2013/2014 er við árslok 2014 gjørd upp til 0,6 mió.kr.

Umframt hetta hava starvsfólk í roknskaparárinum 2014 vunnið rætt til feriu at halda í 2015/2016.

## 13 Eventualskyldur

Kringvarp Føroya er partur í einum sakarmálið. Avleiðingin kann gerast, at Kringvarp Føroya skal rinda sakarmálskostnað og endurgjaldskrav.